Bora eftir olju á telefonverkinum

Oljuútbúgvingarsamtakið bjóðar nú eini 20 føroyingum at taka altjóða skeið í boring eftir olju. Ein partur av undirvísingini á skeiðinum fer fram sum fjarundirvísing av sjónvarpsskermum í einum fundarhøli á telefonverkinum

LEIF LAADAL

Fyri at føroyingar ikki skulu standa á berðum um nøkur ár, tá ið oljufelagini fara at bora eftir olju rundanum oyggjarnar, bjóðar oljuútbúgvingarsamtakið 20 føroyingum at taka eitt sjey vikur skeið í boring. Undirvísingin er skipað eins og liknandi undirvísing í útlandinum og serligt samatarv er gjørt við Stavanger Maritime skule, so skeiðið verður góðtikið av norska OLF, sum stendur fyri Oljeindustriens Landsforening.

Beinleiðis samband í sjónvarpi

Av tí at nogvir av teimum lærarum, sum skulu undirvísa skeiðluttakarunum, eru staddir í útlandinum, fer ein partur av undirvísingini fram við beinleiðis sjónvarpssambandi. Skeiðluttakarnir sessast á vanliga hátt í einum undirvísingarhøli, men ístaðin fyri at ein lærari stendur frammanfyri teimum, so er hesin at siggja á einum skermi. Ljóð- og myndasamband er beinleiðis, so komunikationin kann ferðast báðar vegir.

Claus Reistrup, sum er undirvísingarleiðari hjá oljuútbúgvingarsamtakinum, sigur, at hetta slag av undirvísing hevur nogvar fyrimunir. Fyri tað fyrsta ber til at geva skeiðluttakarunum eina lutfaldsliga bilíga dygdargóða undirvísing.

– Um vit til dømis skulu hava ein norðmann henduvegin at undirvísa í átta tímar, so kann hetta léttliga kosta okkum einar 20.000 krónur. Við eini fjarundirvísingarskipanin fáa vit teir somu átta tímarnar fyri minni enn ein triðing av hesum, sigur Claus Reistrup.

Hartil kann sigast, at prisurin á hesum slag av telesambandi er lutfalsliga høgur fyri tíðina, tí hetta er nakað nýtt. Í framtíðini fer prisurin at lækka enn meira, so utreiðslurnar gerast enn minni.

Koma at arbeiða í útlandinum

Tá ið skeiðluttakararnir eru lidnir við grundskeiðið, mugu teir út um Føroyar at arbeiða. Sum nu er, so er eingin byrjaður at bora í Føroyum, men hetta, at skula út í heimin at arbeiða aftana, er just ætlanin við skeiðinum, sigur Claus Reistrup.

– Vit skulu fyrireika okkum til eina komandi oljuvinnu, so vit ikki standa á berum, tá ið gongd kemur á vinnuna, sigur undirvísingarleiðarin.

Tey, sum fáa møguleikan at taka skeiðið, skulu vera før fyri at flyta av landinum eftir lokið skeið, vera mobil, sum tað eitur. Um fólk eru mobil ella ikki, tað er upp til tey sjálvi at døma um, men tað kann hugsast, at vókomandi fer at arbeiða í Noregi ella Skotlandi tey komandi tvey árini.

Ikki er neyðugt at arbeiða so leingi á borpallum, áðrenn ein hækkar í tign, so vonandi hava føroyingar nakrar leiðarar ella undirleiðarar innan oljuboring um nøkur ár. Hetta skeiðið er í hvussu so er fyrsta stig á vegnum.

Endamálið við skeiðnum

Endamálið við skeiðnum er at leggja lunnar undir føroyskan serkunnleika í boring eftir olju. Oljuútbúgvingarsamtakið, sum er eitt samtak millum teknisku skularnar í Havn og Klaksvík, Maskinmeistaraskulan, Føroya Sjómannaskula og Undirvísingar- og mentamalastyrið, vonar, at skeiðið fer at geva luttakarunum eina djupari fatan av mannagongdini, sum verður nýtt, tá ið brunnur verður boraður.

Skeiðið, saman við verkligari upplíðning umborð á borpalli, gevur grundarlag fyri framhaldandi útbúgving innan boring til eitt nu borara ella bormeistara. Hesar útbúgvingar kunnu takast eitt nu á fakskula í Noregi.

Fyrískipararnir av borskeiðinum kunnu ikki lova luttakarunum arbeiði eftir lokið skeið. Kortini royna tey á oljuútbúgvingarsamtakinum at kunna serliga norsk felag um gongdina í Føroyum innan skeiðvirksemi í boring. Á hendan hátt ber til hjá samtakinum at vísa skeiðluttakarunum a felag, sum eru ahugað at taka føroyingar í arbeiði.

Full arbeiðsvika

Meðan skeiðið fer fram, verður undirvist í millum 30 og 35 tímar um vikuna. Undirvísingin er á skulaheiminum við Marknagilsvegin í Havn, og sum sagt a telefonverkinum, tá ið talan er um fjarundirvísing.

Størsta einstaka evni, ið undirvist verður í, er borteknì við tólum. Annars verður undirvist í trystræði, borveskutøkni, fóðringsrør og sementering, elektriskari, pneumatiskari og hydraliskari utgerð, trygd, jarðfræði, testing og logging og pallum.

Eingi formlig krav eru til forkunnleika, men tað er ein fyrimunur, um skeiðluttakarin hevur arbeiðsroyndir innan t.d. mekanisk fak. Claus Reistrup sigur, at ein 10. floksutbúgving ivaleyst ma til, og at umsøkjarar við einari handverkarautbúgving hava fyrimun.

Ahugað kunnu ringja a telefon 31 1749, har Sjurður Guðjónsson kann svara møguligum spurningum.

Grundskeiðið í boring byrjar 19. oktober í ár og endar við skriviligari prøvtøku góðar sjey vikur seinni, tann 4. desember.



Nú fáa 20 føroyingar møguleikan at taka grundskeið í oljuboring. Oljuútbúgvingarsamtaki skipar fyri skeiðinum, sum byrjar 19. oktober í ár, og sum nakað nýtt fer ein partur av undirvísingini fram a stórskiggja, við sonevndari fjarundirvísing.

Smyril hevur siglt sína seinasta tur á Vág – á hesum sinni í øllum førum. Men broytast umstøðurnar av hesum stigi, er ikki óhugsandi at hann aftur fer at sigla hagar

Mynd: Sigmundur Olsen

Suðuroyarleiðin fer ikki at versna í framtíðini

At Smyril ikki longur siglir á Vág, var eitt hjáúrslit av ætlanini at betra um umstøðurnar hjá vinnulívinum í oynni. Landsstýrið arbeiðir framvegis við at betra um sambandið til Suðuroyar

SNORRI BREND

Tað loypti rættiligan hvokk í suðuroyingar, tá Strandferðslan bráðliga broytti ferðsætlanina hjá Smyril.

Fleiri óttaðust fyri, at henda broytingin bert var ein lidur í versnandi tænastustøði a hesi rutuni, sum ma sigast at vera landsvegur teirra til umheimin.

Men landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Finnbogi Arge segði ta, at hetta varð gjørt fyri at loysa ein akuttan tørv hjá vinnuni.

– Suðuroyingar hava onga orsøk at óttast. Sjóvegis sambandið verður ikki verri enn frammanundan – heldur tvørturimoti, sigur hann.

Arbeitt verður alla tíðina innan samferðsludeildini við ferðasambandinum kring landið, m.a. til Suðuroyar, har fleiri alternativ eru a borðinum.

Eingin flúgving enn á sinni

Ein av flutningsmøguleikunum sum nevndir hava verið á Suðuroyarleiðini í framtíðini er flúgving við lítlum flogfari.

Ein áhugabólkur av samferðsluhugaðum monnum gørdi eitt upplegg, sum herfyri varð handað Finnbogi Arge. Sambært hesum uppleggi var ætlanin at flugva beinleiðis millum Suðuroynna, Vágar og Havnina fleiri ferðir um vikuna.

Við hesum endamali ætlaði bólkurin at geva oyggjarfólkinum eitt gott og skjott alternativ at sleppa av oynni.

Ein treytin fyri hesum var tó tann, at landsstýrið segði gott fyri ætlanini og vildi seta nakað av peningi í eitt felag, sum skuldi reka hetta í ávegis sambandið, sum lítlat skuldi byrja longu næsta summar.

Men Finnbogi Arge vísir á, at hann hevur fingið fleiri uttagnir, sum ikki beinleiðis stuðla eini slíkari ætlan.

– Og hyggur tu í uppskotið til figgjarlog fyri 1999, er eingin upphædd sett av til hetta, sigur altso landsstýrismaðurin.

Hann vísir annars til samferðslubólkin hjá vinnumalastýrinum, sum arbeiðir við hesum mali í einum breiðari høpi.

Túrurin á Vág kann koma aftur

Í samgonguskjalinum hjá teimum trimum flokkunum er sambandið til Suðuroyar eisini tikið við sum eitt malunum, ið arbeiðast skal við komandi fyri ár.

Har verður beinleiðis sagt: -Samferðslan við Suðuroynna verður dagfarð beinanvegin. Eisini verður loftvegis sambandið við flogfari kannað-.

Ein partur av hesi ætlan varð gjørd fyri tveimum vikum síðani, tá fraferðirnar vórðu broyttar fyri at betra um umstøðurnar hjá vinnulívinum í oynni. Í hesum sambandi varð tururin til Vágs sleptur sum eitt hjáurslit av hesum stigi.

Finnbogi Arge er tó opin fyri, at ferðaætlanin kann broytast aftur, um tað vísir seg at umstøðurnar í heila tíki eru vórðnar verri við hesi avgerðini.

– Tað liggur tó heilt greitt, at vit hava ongar ætlanir um at forverra sambandið til Suðuroynna í framtíðini, sigur hann, og lovar, at her skal min landsstýrisins partur ikki liggja eftir.

Nýggjan Smyril

Tað eru longu liðin nogv ár síðani Smyril kom til landið, og hann hevur til fulnar vist, at talan var um eitt gott keyp til Suðuroyarleiðina.

Men sum í so mongum øðrum viðurskiftum, næst eisini slit á hesum skipi, sum nu gongur á 30 ára aldri.

Landsstýrismaðurin, ið er fult greiður um hesa støðu, hevur tí í uppskotinum til figgjarlogina fyri næsta ár, skotið upp at seta pening av til nýtt Suðuroyarskip.

Talan er tó als ikki um at fara undir bygging ella prosjektering av einum slíkum, men ein ætlan um eina játtan tey komandi árini. Tá so málið er aktuelt verður hesin peningurin tøkur.

Í uppskotinum verður skotið upp at seta av til -bygging og løguframleiðslu- heilar 60 mio. í 2000 og 2001, og síðani 70 mió. í 2002. So er landsstýrið tilbúgvið, tá ein slík ætlan møguliga verður sett í verk.

23 flutt til Hvalvíkar í ár

SNORRI BREND

1. januar í ár buðu 317 folk í Hvalvík. Men ta talt varð upp 31. juli var talið komið heilt upp á 340.

Í prosentum er talan um ein rættiliga stóran vøkstur – heilt 7,4, sum í tølum svarar til ein vøkstur upp á 23.

Vøksturin í folkatalinum í kommununi hevur verið vaksandi øll 90-arini, eftir at folkatalið var heilt uppi á 370 nýggjarsaftan í 1989.

Hvalvíkar kommuna er kortini ikki tann einasta, sum hevur havt vøkstur í folkatalinum hjá tí ár.

Sama gongdin er serliga vorðin staðfest í prosentum í Eldvík (4,7), Nes (2,3), Skála (2,1), Suðuroy (3,3), Hósvík (2,3), Kirkjubø (1,1), Mykines (6,3), Sandi (2,8), Húsavík (1,9) og í Vági 1,9).

Størstu prosentvísu ávingina er tó talfest í Bøggjar kommunu, ið umfatar Bø og Gásadal. Har er vøksturin upp á heilt 9,5 prosent, sum er ein øking upp á 6 folk hjá tí ár.

Annars økst samlaða folkatalið aftur í stórum. Við ársbyrjan buðu 44.262 folk í Føroyum, meðan vit fyri tveimum manaðum síðani voru 44.801.

Hetta tíðarskeiðið er 218 børn borin í heim, og 1.137 folk flutt til Føroyar úr øðrum londum.

BÝRT TÚ TIL LEIGU?

Vónandi eru húsini, tú býrt í, væl tryggjað, men hvussu er við telduni, sjónvarpinum, klæðunum og øðrum innbúgvi?

Hvør skal gjalda, um tú ella barn títt gera skaða á onnur fólk ella lutir teirra?

Familjutryggingin hjá Trygd gevur tann besta fulnaðin á marknaðinum og serliga góðan fulnað fyri fólk, sum búgva til leigu.

TRYGD

Lat Føroya Banka ella Trygd henda lepan, um tú vilt vita hví, Familjutryggingin er serliga góð hjá fólki, sum búgva til leigu. Samstundis fært tú eitt óbindandi tilboð uppá tø røttu Familjutryggingina.

Eg meti, at virðið á mínum innbúgvi er:

kr. _____ (heilar 100.000 kr.)

TRYGD

Vinarligast sendið tilboðið til:

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

Tel: _____

Tórsgøta 16 Postboks 44 FO-110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11